# Neyðugt er við einum flogvølli aftrat

**Spurningurin um at fáa ein annan fløgvøll í Føroyum er aftur vorðin aktuellur. Hesaferð er Føroya Arbeiðsgevarafelag komið á vøllinum við sínum hugsanum um hetta málið. Og fyri tey er neyvan hugsandi, at vøllurin í Vágum verður nøktandi fyri flogferðsluna í framtíðini**

FLOGVØLLUR
*Snorri Brend*



– Tað er eingin ivi um, at regulariteturin í dag verður ikki nóg góður um nøkur ár, sigur felagið. Hetta er tí at meta sum ein stór forðing fyri menningina í samfelagnum, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag á heimasíðu sínari.

Spurningurin er so nær ein alternativur vøllur skal byggjast, og ikki minst hvar hann skal verða. Tað besta fyri Føroyar er uttan iva, at hann verður lagdur soleiðis, at har er væl flúgvandi, tá illa ber til í Vágum. - Kjakið um framtíðar flogvallarviðurskiftini er ikki bara ein lokalur spurningur í Vágum, sigur felagið. Hetta er fyrst og fremst ein spurnignur fyri alt landið um, hvussu vit fáa skipa okkara framtíðar samband til umheimin á tryggasta og skilabesta hátt.

### Broytingar í framtíðini

Og tað eru nógvar broytingar, ið skulu fara fram innan loftferðsluna í framtíðini.

Tað sigst, at løgmaður skjótt skal skriva undir eina avtalu um at leingja flogvøllin í Vágum, heilt upp í 1650 metrar, vilja tíðindi verða við.

Tað ljóðar eisini, at Vinnumálastýrið er farið undir at kanna, um Føroyar kunnu gerast partur av fræslu loftferðsluni í Europa. Harvið kunnu vit sleppa konsessiónspolitikkinum og almennu reguleringini av loftferðsluni.

Og í triðja lagi hevur Vinnumálaráðharrin boðað frá, at hann metti Atalntic Airways verða millum tey fyrstu feløgini, sum skuldu einskiljast. Í fyrsta umfari kortini ikki meiri enn 49%. Onki var sagt um nakað seinni umfar.

– Hetta eru trý álvarsmál, sum tilsamans hava sera stóran týdning fyri samband okkara við umheimin frameftir. Men vit sakna at hoyra hvørjar politiskar hugsanir liggja aftanfyri. Vit sóknast eisini eftir, hvat landsstýrið og løgtingið vilja við loftferðsluni og sambandinum við umheiminum nú og í framtíðini. Tí sjálvandi eiga trý stórmál sum hesi at verða viðgjørd í ljósinum av tí framtíðarloftferðslupolitikki Føroyar hava, sigur Arbeiðsgevarafelagið.

**sb.**

## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyggin í sori

**Tann vantandi orkan og viljin hjá sitandi samgongu at føra vinnupolitikk er ein orsøk til, at Suðuroyggin í dag liggur í sori vinnuliga. 380 menniskju í ALS umframt øll tey langtíðararbeiðsleysu, sum fyri langari tíð síðani eru dottin úr arbeiðsloysisskipanini og kanska inn undir almannastovuna**



**Heidi Petersen,**
*løgtingskvinna*

Hvør spyr eftir hesum menniskjum í dag? Familjur, kvinnur, menn og børn í øllum aldri, sum onki tilverugrundarlag hava havt í langa tíð? Hvussu sær gerandisdagurin hjá hesum menniskjum út? Hvat hava tey at fara upp til hvønn morgun? Hvussu halda tey dagin gangandi? Hvat mót hava tey upp á tilveruna? Hvørja lívsdygd eiga tey? Hvussu ávirkar hetta børnini, og hvørji langtíðarárin hevur hetta á tey og tilveru teirra? Í størri samanhangi kann eisini verða spurt, hvørji langtíðarárin henda kreppa hevur á alt samfelagið í Suðuroynni og á Føroyar annars?

Hvat skal til, so hesar familjur aftur kunnu fóta sær? Hetta umfatar bæði vinnupolitisk átøk, men eisini - og ikki minst - sosial/mentunarlig tilboð til kreppuraktu familjurnar.

Hvør eigur uppgávuna at lýsa hesi viðurskifti? Eftir mínum tykkieiga almennu Føroyar hesa uppgávu. Vit hava nógvar góðar stovnar, við vælútbúgvnum fólki, sum í felag kundu tikið hond um hesar spurningar. Eitt nú Fróðskaparsetur Føroya, Granskingardepilin, men eisini tey ráð, ið vara av hesum fólkum so sum Almanna- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið.

Mín áheitan til myndugleikarnar er tí: Fáið gongda á - ongantíð ov skjótt!

### Sosial/mentanarpoliti sk tiltøk

Tað tykist kanska einfalt at siga, at myndugleikarnir eiga at traðka til, men er politiskur vilji til staðar, og ikki bert henda vantandi málseting og handlikraft, sum vit síggja hjá sitandi samgongu, so eru nøkur vinnupolitisk og sosial/-mentanarpolitisk átøk, ið kundu gjørt veruligan mun.

Lat meg nevna nøkur og byrja við menniskjunum. Fyri skúlabørn, ung og vaksin kundu myndugleikarnir sett fleiri pengar av til:

- musikkskúlaskipanina og gjørt tað ókeypis at luttikið hjá børnum og vaksnum, har tey vóru arbeiðsleys.
- frítíðarundirvísingina í skúlunum, so børnini kundu fingið fleiri undirvísingartímar í tilevning, máling, matgerð, smíð, ítrótti, hanarbeiði o.s.fr., alt eftir áhuga sjálvandi.
- ítróttarfeløgini, so til bar at seta venjarar í fulltíðarstarv.
- kvøldskúlaskipanina, so ung og vaksin kundu vunnið sær førleika innan nógv ymisk øki - kanska hugsa um onkra førleikagevandi útbúgving, sum kundu gjørst partur av einum alternativum vinnuvegi í oynni. Hugsi um ferðavinnuna, KT-vinnuna, tónleikavinnuna o.a.

### Almennar íløgur

Samgongan hevur fulla ábyrgd av, at miðnámsskúlin í Vági nú liggur í andaleypi. Eitt skúladømi upp á dugnaloysi og ábyrgdarloysi hjá politiska myndugleikanum við Javnarflokkinum á odda. Tann menturnardepilin, sum ein miðnámsskúli í Vági kundi ment seg til, og sum veruliga hevði givið býnum eitt lyft inn í framtíðina, hevur henda samgongan gjørt til eitt klandursmál í Suðuroynni og tilvitað sett íbúgvar og bý- og bygdarráð upp ímóti hvørjum øðrum.

Í staðin fyri at siga við suðuroyingar, vit vilja raðfesta tykkum høgt í hesum tíðum og eisini byggja eitt ellis- og røktasrheim í Vági, fer samgongan inn og niðurbrýtur tann lítla glottan fyri framman, sum undanfarna samgonga setti skjótil á. Politiskt dugnaloysi og ábyrgdarloysi, sum liggur uttanfyri alt mark.

Suðuroyggin eigur sera lítlan lut í almennu fyrisitingini, so upplagt hevði verið at lagt umsitingina hjá Strandferðsluni í Suðuroy, nú Smyril skjótt gerst einasta stóra ferðafólka- og farmaleið hjá Strandferðsluni. Men aftur her sakna vit politisk mál og vilja til veruliga at bøta um støðuna.

### Vinnupolitisk átøk

Fyrsta vinnupolitiska uppgávan eigur at vera at skipa fyri beinleiðis flutningsmøguleikum úr Suðuroynni niður á meginlandið tvær ferðir um vikuna. Hetta hevði verið ein almenn innbjóðing til feskfiskaframleiðarar um at stovna virksemi í Suðuroy.

Umframt hetta eigur bæði ferðafólka- og farmakostnaðurin at verða endurskoðaður, og sjálvsagt er, at túratalið hjá Smyrli um Suðuroyarfjørð verður økt munandi.

So til spurningin um atkomuligheitina til vinnuvirkini í oynni. Føroya Fiskavirking hevur lagt árarnar inn í Suðuroynni, og eftir mínum tykki við sera ivasomum argumentum. Tá leiðslan hevði havt ábyrgdina av at reka virkini í nakrar fáar vikur, vóru virkini latin aftur, tí tey góvu hall. Eg skilji væl, at ikki áhaldandi ber til at reka virki við halli, men eftir so fáum vikum haldi eg ikki, leiðslan hevur gjørt nakra veruliga roynd at fáa tað at bera til. Ein og hvør leiðsla hevur til uppgávu at síggja til, at virkið ber seg, men hetta krevur tíð og ein møguleikar. Virkini í Suðuroy fingu ongan veruligan møguleika. Avhøvdaði eftir 6 vikum – spell!

Kravið til Fiskavirking eigur at vera, nú tað hevur spælt fallit í Suðuroynni, at onnur sleppa framat virkinum í Vágið, ið hevur ligið stilt nú í nógv Harrans ár.

### Samanumtikið

Samanumtikið kann sigast, at breiða samgongan ikki røkir áhugamálini hjá borgarum í Suðuroynni. Tíðin og tilvildin ræður. Oyggin rekur fyri vág og vind, tí ongin politisk handlikraft er til staðar, og undir slíkum umstøðum fæst onki at næla.